# Umvelting í Týsklandi



*Bilførarar, sum ikki hava umhvørvismerki í forrútinum á bilinum, fáa bót í nógvum týskum býum*

**Bilførarar, sum fara av landinum við egnum bili og ætla sær til Týsklands at koyra, mugu hava umhvørvismerki í forrútinum á bilinum fyri at sleppa undan at fáa bót í nógvum týskum býum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í nógvum týskum býum eru skelti sett upp við áskriftini "Umweltzone" (Umhvørviszona) fyri at vísa á at bert bilar sum eru umhvørvisgóðkendir kunnu kunnu koyra har.

Teir bilar sum verða góðkendir kunnu fáa umhvørvisskeltir í trimum litum: grønt, gult ella reytt, alt eftir hvussu hvussu høgt $CO_2$ útlátið er. Hetta er eisini galdandi fyri akfør, sum ikki eru skrásett í Týsklandi, bæði persónbilar, lastbilar og bussar.

Tað er loyvt at koyra í Týsklandi uttan hesi umhvørvismerki, men tað er ikki loyvt at koyra inn í teir býir, sum hava hesar umhvørviszonir. Tey sum bert koyra á týsku motorvegunum nýtast ikki at hava hesi umhvørvismerkir, men so mugu tey fylgja væl við, um tey koyra inn í ein býir, sum hava hesar zonir.

Umhvørvisskeltir eru í løtuni sett upp í umleið 40 týskum býum, og vanliga bótin fyri at koyra inn í ein bý uttan umhvørvismerki er 40 evrur.

Hvørja ferð koyrt verður gjøgnum eina týska umhvørviszonu, uttan umhvørvisskelti í forrútinum, er vandi fyri at fáa bót, sigur Arne Willerslev-Legrand, stjóri í Applus Bilsyn í Danmark, sum er eitt av teimum fáa støðunum, har umhvørvismerkini kunnu keypast. Sum skilst kunnu tey eisini keypast hjá FDM.

Hóast hetta eisini er galdandi fyri føroyingar, sum ætla sær til Týsklands at koyra, hava vit enn onga skipan í hesum sambandi.





*Sámal av Reyni sølustjóri hjá Reyni Service*

# Innkalling av Toyota

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Tilsamans 240 Toyota eigarar í Føroyum fara at fáa boð um at koma til eftirlit við bilum sínum.

Í hesum døgum verða Toyota bilar kring allan heim kallaðir inn til eftirlit, tí spitarin á onkrum av bilunum kann seta seg fastan undir koyring.

Sámal av Reyni, sølustjóri hjá Reyni Service, sigur, at í Føroyum skulu 240 bilar kallast inn. Talan er mest um modellini Toyota Auris og Yaris. Innkallingin byrjar í næstu viku.


*Agnar Joensen frá ATV Mountain*

# Bilradio hósdagin

Í sendingini Bilradio á Rás2 hósdagin eftir tíðindini kl. 16 er prát við vestmenningin Agnar Joensen frá ATV Mountain, sum sigur frá um koyring við ATV í fjøllunum og í haganum nærhendis Vestmanna.

Eisini verður vitjað í nýggju hølunum hjá Pitstop á Hjalla, sum nú er partur av donsku verkstaðsketuni Mekopartner. Í hesum sambandi er samrøða við Olaf Mortensen frá Pitstop og við pápan Óla Mortensen frá Sp/f Triv, sum heldur til í sama bygningi sum Pitstop og Mekopartner.

Prát er eisini við Poul Laust Christiansen frá bil.fo um nýggju heimasíðuna.